# Leitaðu eftir heilivági á trolarum



*Fríggjanáttina var innbrot umborð á partrolarunum Skansatanga og Research. Gerningsmenninir hava leitað eftir heilivági, men hava einki fingið við sær*

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Náttina til leygardagin var innbrot umborð á tveimum partrolarum, ið lógu við vestari bryggju í Havn.

Tað eydnaðist tó ikki gerningsmonnunum at fáa nakað við sær av skipunum, tí skipararnir hava ikki boðað frá, at nakað er horvið.

Fyrst vóru menninir umborð á Skansatanga, ið er ein lítil trolari. Har hava teir brotið inn á brúnna, har leitað hevur verið í heilivágsskápinum, men einki var at finna. Síðani eru teir farnir inn í kamarið hjá skiparanum, har teir hava leitað væl og virðiliga í skuffum og skápum, men einki hava teir funnið.

Síðani fóru menninir umborð á trolaran Research, ið lá uttanfyri Skansatanga. Her leitaðu menninir eisini eftir sterkum heilivági, men úrtøkan var soltin.

Her hava teir leitað á brúnni og hava eisini roynt at sleppa inn í kamarið hjá skiparanum, men tað eydnaðist ikki at fáa hurðina upp.

Løgreglan sigur, at skipararar vanliga taka heilivágin við sær av skipinum, meðan tað liggur við bryggju. Hetta verður gjørt, tí nógv innbrot eru umborð á bátum og skipum. Serliga eru tað rúsevnismisnýtarar, ið fremja hesi innbrotini, tí teir vænta at finna sterkan heilivág umborð. Fyrr var eisini vanliga at goyma heilivág umborð á bjargingarbátum, men hetta verður heldur ikki gjørt longur.






## Svanur dripin av hundi

SVANAR
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin seinnapartin fekk løgreglan í Havn fráboðan um ein deyðan svan í viðarlundini í Havn.

Tað var ein maður, ið starvast hjá Skógrøkt Landsins, sum rakti við tann deyða svanin. Hesin lá fjaldur undir nøkrum trøum við ovaru tjørnina. Tað tyktist, sum onkur hevði roynt at fjala tann stóra fuglin, ið búleikast í viðarlundini.

Løgreglan var á staðnum og hevur skrivað eina frágreiðing um málið. Djóralæknin hevur kannað fuglin, og hann metir, at svanurin er deyður av biti av hundi.

Løgreglan heldur tí, at eigarin kanska hevur roynt at goyma svanin.

Fyri nøkrum árum síðani varð ein svanur skotin til deyðis við høglbyrsu av ótangum. Hetta er so aðru ferð innan stutta tíð, at svanarnir eru fyri ágangi.



# Sjúkrasystrar á B 6 angra einki

**– Eg ivist í um eg hevði gjørt hetta einaferð afturat, segði Ingun Gaardbo, álitisfólk hjá sjúkrasystrunum á B 6 á Landssjúkrahúsinum, tá ið tær møttu aftur til arbeiðis í gjár**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*

Eg sigi fyri meg: Eg skuldi havt gjørt hetta fyri einum ári síðani.

Tað var ongin angur at hóma hjá Ingun Gaardbo, sjukrasystir á B 6 á Landssjúkrahúsinum, tá ið hon kom aftur til arbeiðis í gjáramorgunin.

Tá ið hon fór í jólafrí var annars onki sum bendi á, at hon fór aftur til arbeiðis á Landssjúkrahúsinum. Saman við 17 øðrum sjúkrasystrum á B 6, hevði hon sagt upp fyri at mótmæla tí harða arbeiðstrýstinum. Men í evstu løtu boygdi leiðslan á Landssjúkrahúsinum seg og játtaði at seta 1,8 sjúkrasystir aftur í eina tíð, ímeðan virksemið á medisinska deplinum verður endurskoðað.

Tískil møttu allar aftur til arbeiðis í gjáramorgunin og B 6 læt sostatt upp aftur sum ætlað.

Umframt at vera sjúkrasystir, er Ingun Gaardbo er eisini álitisfólk og talskvinna hjá sjúkrasystrunum á B 6, sum rættiliga hava sett viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum í brennidepilin seinastu vikurnar.

– Tá ið vit søgdu upp, var tað í maktaloysi, tí arbeiðstrýstið er alt og hart, sigur Ingun Gaardbo.



*Nú Sjúkrasystrarnar á B 6 á Landssjúkrahúsinum fóru aftur til arbeiðis í gjáramorgunin, gera tær greitt, at tær angra ikki tað, sum er farið fram seinastu vikurnar. Men álitisfólkið, Ingun Gaardbo, ivast í, um hon hevði gjørt hetta einaferð afturat*

Hon leggur samstundis dent á, at sjúkrasystrarnar høvdu ikki avtalað at sagt upp.

– Hetta var ein avgerð, sum vit 18 sjúkrasystrar tóku hvør sær, sigur hon.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvat fólk hava hildið um støðuna, sum sjúkrasystrarnar á B 6 tóku.

Nógv hava stuðlað teimum. Prógv um tað fekst tá ið teir høvdu seinasta arbeiðsdagin fyri jól, tí tá fingu tær bæði blomstur og annað gott.

Hinvegin hava ávísir læknar verið í øðini. Jákup Petersen yvirlækni hevur alment skuldsett sjúkrasystrarnar fyri at neyðtaka Landssjúkrahúsið og ein annar yvirlækni hevur skírt hetta »talibanmetodur«.

Men hetta rørir ikki Ingun Gaardbo.

– Eg haldi at hesar skuldsetingarnar eru ikki annað enn ein avleiðing av, hvussu sperd starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum eru, og so skal tað ganga útyvir onkran, sigur hon.

Hon sigur, at sjúkrasystrarnar á B 6 taka ikki skuldsetingarnar so tungt.

– Tað, sum hevur nógv størri týdning fyri okkum, er, at okkara egni leiðandi yvirlækni á medisinska deplinum, Jón á Steig, bað okkum góðan morgun og ynskti okkum vælkomnum aftur og segði, at hann var glaður fyri at síggja okkum aftur. Hvat onnur siga, nervar okkum ikki so nógv. Tí heldur hon avgjørt ikki, at hetta fer at birta uppundir aftur tær ósemjur, sum hava verið ímillum læknar og sjúkrasystrar.

### Gjørdu tað rætta

Hon sigur, at sjúkrasystrarnar á B 6 halda framvegis, at tær gjørdu tað rætta.

– Skal eg siga fyri meg sjálva, so angri eg, at eg ikki gjørdi hetta fyri einum ári síðani, leggur hon afturat.

Hon sigur, at tað var avgjørt ikki til stuttleika, at tær søgdu upp, ein fyri og onnur eftir.

– Tað er ræðuligt, at tað skal vera neyðugt at fara so ógvusliga til verka, áðrenn nakað hendir, sigur hon.

Men hóast tað eydnaðist at finna semju, ivast hon í, um hon hevði gjørt hetta einaferð afturat – at sagt upp fyri at leggja trýst á leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

– Tað hevur staðið nógv á til tíðir og í hesi vikuni høvdu fleiri av okkum fingið tíð til fund hjá ALS Semjan ímillum leiðsluna á Landssjúkrahúsinum ber í sær, at 1,8 sjúkrasystir verður sett á B 6 afturat, til 1. juni.

Hetta hálva árið skulu skal virksemið á medisinska deplinum endurskoðast.

Ingun Gaardbo væntar avgjørt, at hetta verður eitt arbeiði, sum sjúkrasystrarnar fara at taka lut í.

Tó kann hon onki siga, fyrrenn tær eru kunnaðar um ætlanirnar hjá leiðsluni.

– Spurningurin er kanska meiri, hvat sjúkrasystrarnar á B 7 og á onkologiska ambulantorii siga, tí eftir, hvat skilst, skulu bygnaðarbroytingarnar á B 6 eisini umfata tær og tað verður kanska størri broytingar hjá teimum, enn hjá okkum á B 6.

# Øll nótaskipini á makrelveiði

**– Tá ið skipini fara aftur á lodnu- og svartkjaftaveiði um einar tvær vikur, vænta vit, at gongd kemur á aftur í Fuglafirði, siga tey á Havsbrún**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Enn gongur helst ein tíð, áðrenn fyrstu lastirnar av ídnaðarfiski verða landaðar til Havsbrún í Fuglafirði. Øll nótaskipini eru á makrelveiði, og hesin fiskurin verður landaður til matna í Noregi. Á Havsbrún rokna tey tó ikki við, at skipini verða so leingi á makrelveiði, kanska einar 14 dagar ella so. Tað veldst tó um, hvussu fiskiskapurin verður. Síðan fara nøkur skip at fiska lodnu, onnur svartkjaft, og tá væntar Havsbrún, at gongd fer at koma á aftur í Fuglafirði.



### Neyðugur steðgur

Tað kemur tó ikki illa við hjá ídnaðar-og fóðurvirkinum, at skipini eru á makrelveiði hesar fyrstu dagarnar í nýggja árinum, tí virkið tekur ikki móti ídnaðarfiski kortini.

– Hetta er einasta tíðin av árinum, har øll framleiðslan liggur still. Vanliga verður virkið latið uppaftur fyri móttøku umleið 10. januar. Vit hava brúk fyri hesi tíðini, tí neyðugar ábøtur og ymisk eftirlit skulu fremjast.

Í hesum døgum arbeiða maskinmenn og reperatørar við at gera virkið klárt aftur, og onkur eftirlitsmaður hevur eisini verið fram við.

### Sýn av dampketlum

Á Havsbrún hevur t.d. verið ketlasýn. Teir tríggir dampketlarnir, vit brúka í framleiðsluni, eru sýnaðir. Hesir skulu nevniliga sýnast einaferð um árið, og tað eru útlendingar, sum taka sær av hesum.

– Arbeiðseftirlitið hevur ikki fyritreytir at gera hetta eftirlitsarbeiði, og tí verður hetta gjørt at alment góðkendum útlendingum, siga tey á Havsbrún.

Um einar 14 dagar ella so, vænta tey, at gongd er komin á aftur framleiðsluna á virkinum.